UTTAN ÚR HEIMI

Tíðindamaður tikin

Mikukvøldið tók ísraelska løgreglan bretska tíðindamannin Peter Hounam, og um kvøldið var hann til avhoyringar hjá trygdartænastuni Shin Bet. Seinni um kvøldið váttaðu myndugleikarnir, at Peter Hounam var settur í varðhald.

Peter Hounam er ikki hvør sum helst. Tað var hann, sum gjørdi samrøðuna við ísraelska kjarnorkuverkfrøðingin Mordechai Vanunu í oktober í 1986. Har avdúkaði Vanunu, at Ísrael hevði kjarnorkuvápn. Tað kostaði honum 18 ára fongsul, og hann varð latin leysur fyri stuttum.

Ísraelsku myndugleikarnir hava givið Vanunu sera avmarkað frælsi, sjálvt um hann er liðugur við revsingina. Hann hevði kortini játtað at lata BBC gera ein film um seg, og tað var í teimum ørindunum, at Peter Hounam var farin til Ísraels. Vanunu segði í gjár, at avgerðin hjá Shin Bert at handtaka Hounam er enn ein roynd hjá myndugleikunum at doyva alt tos um tey ísraelsku kjarnorkuvápnini.

Hastverk er lastverk

Tann fyrsta royndin hjá evropearum at senda eitt rúmdarfar til Mars miseydnaðist, tá einki hoyrdist aftur frá farinum "Beagle 2", sum eftir ætlanini skuldi seta seg á Mars sjálvan jóladag í fjør.

Ein nevnd, sum hevur kannað verkætlanina við "Beagle 2", sigur, at alt ov fáar royndir vórðu gjørdar við farinum, áðrenn tað varð sent út í rúmdina. Nevndin sigur eisini, at farið bleiv gjørt í skundi, og at alt ov lítlir pengar vóru játtaðir til verkætlanina. Um sjálva orsøkina til, at lendingin miseydnaðist, sigur nevndin, at helst er "Beagle" kolað upp á veg niður á Mars, ella hevur farið hildið leiðina fram longri út í rúmdina.

Ein lítil uggi er tað kanska, at tann fyrsta evropeiska Mars-royndin er minni enn so tann einasta, sum er miseydnað. Næstan 20 onnur før hava fingið somu lagnu. Hinvegin eydnaðist tað amerikanarunum fyrr í ár at fáa tvey før at seta seg á Mars.

Fleiri eldri á alnótini

Alt fleiri og fleiri danir fáa sær atgongd til alnótina, og tað eru serliga tey eldru, sum vilja hava samband við umheimin.

Nýggj tøl hjá donsku hagstovuni vísa, at 83 prosent av øllum dønum hava atgongd til alnótina í dag. Annaðhvørt hava tey teldu við atgongd til alnótina heima við hús ella á arbeiðsplássinum ella í skúlanum. Sambært hagstovuni veksur talið støðugt. Fyri einum ári síðani høvdu 79 av øllum dønum atgongd til alnótina, og eitt ár frammanundan var talið 76 prosent.

Tað eru sum vera man tey ungu, sum hava størstan áhuga fyri alnótini, og í Danmark hava 96 prosent av teimum 16 til 19 ára gomlu atgongd til alnótina. Men hagstovan sigur, at tey eldru fylgja væl við. Av teimum, sum eru ímillum 60 og 74 ár, hava 54 prosent atgongd til alnótina, og hesin aldursbólkurin vaks mest í fjør, sigur hagstovan.

Dýrur lesnaður

Tað eru tey, sum eru til reiðar at gjalda nógvar pengar fyri at fáa fatur á gomlum bløðum og bókum.

Á einari uppboðssølu hjá norska forlagnum Cappelen mikukvøldið rindaði ein keypari 9.000 norskar krónur fyri ta fyrstu norsku útgávuna av Anders And. Blaðið kom út í desember í 1948 og kostaði tá 50 oyru. Ein latínsk bønarbók frá 1522 fekk tann besta prísin á uppboðnum. Hon fór fyri 200.000 krónur.

Tann kendi norski barnabókahøvundurin Torbjørn Egner er framvegis væl umtóktur í Noregi. Á uppboðnum mikukvøldið varð eitt eintak av bókini "Billedbok for Per", sum kom út í 1946, selt fyri 6.500 krónur, og fimm litmyndir av høvundinum fóru fyri 12.000 krónur, skrivar Aftenposten.

Hendan haitiska kvinnan slapp frá illveðrinum við lívinum, men hon hevur mist alt, sum hon átti

Mynd: Reuters

Øll bygdin doyði

Í gjár eydnaðist bjargingarliðum í Haiti at sleppa til ta fjarskotnu bygdina Mapou

ÓDNARVEÐUR
Árni Joensen
fartekst@mail.dk

Vatnflóð og skriðulop hava darvað bjargingarliðunum, sum royna at bjarga fólki aftan á tað ógvusliga grimdarregnið í Haiti og Dominikanska Lýðveldinum.

Í gjár eydnaðist tað bjargingarliðunum at sleppa til ta fjarskotnu bygdina Mapou har eysturi í landinum. Men har var ikki nógv at gera, tí tey meira enn túsund bygdarfólkini lógu jarðað undir mold og runu.

Myndugleikarnir í Haiti siga, at meiri enn 1650 fólk hava latið lív av illveðrinum, og í grannalandinum Dominikanska Lýðveldinum eru meiri enn 350 funnin deyð.

Í báðum londunum vænta myndugleikarnir at finna uppaftur fleiri lík. Sagt verður, at fleiri hundrað fólk eru ikki komin afturíaftur.

Yvirgangsávaring liður í valstríði

Ávaringin um møguligt álop á USA er liður í valstríðnum upp undir forsetavalið í heyst

USA
Árni Joensen
fartekst@mail.dk

Amerikonsku myndugleikarnir ávara nú amerikanararnar um, at yvirgangsfelagsskapurin al-Qaeda fyrireikar álop á mál í USA í summar. Nevnt verður, at uppstillingarfundirnir upp undir forsetavalið í november kunnu vera álopsmál.

Men eygleiðarar í USA halda, at ávaringin er liður í valstríðnum hjá George W. Bush, forseta.

– Stjórnin noyðist at ávara fólkið um, at okkurt kann vera í væntu. Tí skuldi okkurt hent, kann hon nú vísa á, at fólkið var ávarað, sigur ein av eygleiðarunum við tíðindastovuna Reuters.

Aftan á álopið tann 11. september í 2001 var Bush-stjórnin fyri hvøssum atfinningum, tí hon hevði ikki tikið upplýsingar um eitt komandi álop í álvara.

ST-hermenn misnýta smágentur í Kongo

ST-hermenn, sum hava støð í Kongo, misnýta gentur niður í 13 ára aldur. Afturfyri fáa tær mat frá hermonnunum

MISNÝTSLA
Árni Joensen
fartekst@mail.dk

ST hevur sent hermenn til Kongo at verja sivilfólkið ímóti ágangi frá uppreistrarbólkum. Hermenninir eru úr Marokko og Uruguay, men sambært bretska blaðnum The Independent gera teir sær dælt av mattrotinum í økinum.

Blaðið hevur tosað við fleiri ungar gentur í flóttafólkaleguni Bunia. Tær greiða frá, at tær hava ov lítið til matna. Hermenninir hjá ST hava harafturímóti ovmikið, og teir lata gleðiliga genturnar fáa burturav, men prísurin er kynsligt samband.

Hjálparfelagsskapurin Atlas váttar fyri The Independent, at søgurnar hjá gentunum eru sannar. Felagsskapurin sigur, at nógvar av teimum ungu gentunum eru illa fyri frammanundan, tí fleiri teirra vórðu neyðtiknar, áðrenn tær sluppu frá uppreistrarmonnunum.

Talskvinnan hjá ST í Kongo, Dominique McAdams, sigur við The Independent, at søgurnar hjá gentunum verða kannaðar. Sjálv ivast hon ikki í, at hald er í teimum flestu, men hon leggur afturat, at tað er torført at prógva, at genturnar verða misnýttar.

NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Andrea Falkvard, Miðvágur:

Málningaframsýning á Ellisheiminum í Vágum

Leygardagin 29. mai kl. 14.00 letur Andrea Falkvard, listakvinna, upp eina framsýning við ekspressionistiskum málningum á Ellisheiminum í Vágum. Á framsýningini verða umleið 10 ekspressionistiskir málningar

Andrea Falkvard er 23 ára gomul og ættað úr Miðvági. Hon hevur útbúgving frá "Den Frie Ungdomsuddannelse" í Danmark, har hon hevur verið í starvsvenjing hjá fleiri ymiskum listafólkum, sum arbeiddu við t.d. grafikki og málningalist. Eisini hevur hon arbeitt í einum handli, sum framleiðir og selur keramiklutir.

Undir síni útbúgving hevur Andrea eisini arbeitt við prýðislutum sum listaverk, klæðnadesigni, foto og tikið stakgreinar í psykologi, listasøgu og enskum og donskum bókmentum.

Andrea, sum eisini var við á Várframsýningini í ár, hevur søkt inn á kunstakademi í Danmark, og í løtuni bíðar hon eftir svari.

Framsýningin verður opin frá 29. til og við 31. mai frá kl. 16-20.

Poul Henrik Poulsen, Tórshavn:

Settur stjóri á Føroya Fornminnissavni

Poul Henrik Poulsen í Havn er settur sum fyribils stjóri á Føroya Fornminnissavni.

Poul Henrik er 38 ára gamal, havnarmaður og útbúgvin cand. merc. Liðugur við útbúgvingina arbeiddi hann í Danmark eina tíð, áðrenn hann flutti heim til Føroya.

Komin heim aftur til Føroya í 1995, undirvísti hann á Føroya Handlisskúla í Havn og á Kambsdali, samstundis sum hann arbeiddi við marknaðarføring á trolvirkinum Vónini.

Í 1996 fekk hann starv á marknaðardeildini hjá Føroya Tele, har hann seinni bleiv marknaðarleiðari.

Í 2000 flutti hann til Norra at arbeiða. Har var hann m.a. við til at seta eina fyritøku á stovn.

Síðan 2002 hevur hann rikið sína egnu fyritøku við virkisráðgeving í Havn.

Poul Henrik er sonur Áslu, f. Mouritsen, og Tórbjørn Poulsen í Havn. Hann er giftur við Katrin úr Havn, og tey eiga eina dóttir.

Vegurin millum Kvívík og Vestmanna 60 ár

27. mai vóru 60 ár liðin síðan vegurin millum Kvívík og Vestmanna alment varð tikin í brúk. Annfinn Bláhamar í Vestmanna var við í einum av fyrstu bilunum, sum koyrdi á hesum strekki tann dagin

Sverri Egholm skrivar í Birting 2000 m.a. " Í 1921 farið undir at fullføra vegagerðina millum Kvívík og Kollafjørð. Í 1943 komið so langt við vegagerðini millum Kvívík og Vestmanna, at bert eitt stutt strekki var eftir í Gassádali. Men umsíðir tann 7. mai 1944 koyrdi Carl A. Jensen í Kollafirði sum tann fyrsti út til Vestmannar við ferðafólki. Liðugur var vegurin ikki fyrr enn seinni".

Annfinn Bláhamar í Vestmanna var sum smádrongur við í einum av fyrstu bilunum, sum koyrdu millum Vestmanna og Kvívík tann dagin vegurin alment varð latin upp. Myndin er tikin í Gassádali millum brúgvarnar, sum máttu gerast áðrenn koyrandi var millum bygdirnar

Mynd: Jens Kristian Vang

Tann 27. mai 1944 varð so vegurin tikin alment í nýtslu. Annfinn Bláhamar í Vestmanna, sum tá bert var 4 ára gamal, var við í Chevrolet laststrongum hjá pápanum, Fríðriki Bláhamar, hendan dagin tá teir sum ein av fyrstu bilunum koyrdu í gjøgnum til Kvívíkar.

Galerie Focus:

Hansina og Vígdis í Galerie Focus

Hansina Iversen sýnir fram málningar, og Vígdis Petersen sýnir fram keramikk, betong og glas

Mynd: Jens Kristian Vang

TÍÐINDASKRIV

Fríggjadagin 28. mai kl. 16 lata Hansina Iversen og Vígdis Petersen upp listaframsýning í Galerie Focus í Gríms Kambansgøtu í Havn.

Hansina Iversen sýnir fram málningar, og Vígdis Petersen sýnir fram keramikk, betong og glas.

Framsýningin verður opin til 11. juni, týsdag til fríggjadag kl. 14 til 18 og leygardag kl. 16 til 18.

Listasavn Føroya:

Listarligur leiðari settur frá 1. august

TÍÐINDASKRIV

Listasavn Føroya hevur sett 27 ára gomlu Inger Smærup Sørensen í starv sum listarligur leiðari frá 1. august 2004.

Inger Smærup Sørensen er cand. mag í listasøgu, og í dag starvast hon sum listarligur leiðari á Heerup Museum í Keypmannahavn.

Dagurin

28. mai. Vilhjálmur, deyður í 812. Hertogi í Gascogne í Fraklandi. Var ein av kempunum hjá Karlamagnusi keisara. Tað er um hann, at Sjóvarbóndin yrkti kvæðið Viljorm Kornus. Hann fór í kleystrið inn at bøta sínar syndir. Seinni legði hann út aftur í herstrið, men halgisogan sigur, at hann á gamalsaldri aftur fór í kleystrið, sum hann sjálvur hevði grundað.

Upprunaliga týskt navn, *vilji* og *hjálmur*.

Móttøka

Í samband við at Jákup Frants Larsen býráðsskrivari hevur verið í starvi hjá Fuglafjarðar kommunu í 30 ár, verður skipað fyri almennari móttøku í býráðshúsinum

Fríggjadagin 4. juni 2004 - kl. 15.00 - 18.00

Fuglafjarðar býráð